# 1 Fyrning av skuld - serliga søla av vørum ella tænastum o.ø.

## 1.1 Lógargrundarlag

Lógargrundarlagið undir fyrning av skuld er DL 5-14-4 (danska lóg)/NL 5-13-2 og fyrningarlógin, *Lov nr. 274 af 22. december 1908 om Forældelse af visse Fordringer*, ofta nevnd 1908-lógin. Fyrningarfreistin sbrt. DL 5-14-4/ NL 5-13-2 er 20 ár, frá tí at avtalan, sum kravið byggir á, er gjørd. DL 5-14-4/ NL 5-13-2 er galdandi fyri skuldarbrøv (gældsbreve), meðan tað í § 1 í fyrningarlógini er ásett, hvørji krøv hon er galdandi fyri og ikki.

### 1.1.1 Hvørji krøv (vit leggja dent á sølu av vøru og tænastum)

Krøv fevnd av § 1 í fyrningarlógini eru m.a.:

1) Krøv, sum byggja á avtalu um:
   a. Sølu ella aðra avhendan av vøru ella øðrum leysafæ, sum ikki er avhendað sum partur av fastari ogn
   b. Nýtslu av fastari ogn ella leysafæ - vanliga nevnt "leiga"
   c. Gjald fyri uppihald, vistarhald ella líknandi
   d. Flutning av persónum ella góðsi
   e. Framt arbeiði av einum hvørjum slagi.

### 1.1.2 Hvørji krøv ikki fevnd av "fyrningarlógini" (1908)

5 ára fyrningarfreistin er ikki galdandi, tá ið eitt skuldarbræv er latið fyri kravið, ella um annað rættarligt grundarlag er útvegað (stevning ella áheitan um arrest), sum hevur við sær (dómur, rættarsemja e.a.), at skuldari viðurkennir støðd og tilveru á skuld – ella um tað á annan hátt skrivliga er sligið fast, at skuldin er til. Tá kemur kravið undir fyrningarfreistina í DL 5-14-4/ NL 5-13-2.

### 1.1.3 Fyrningarfreistin

Fyrningarfreistin sbrt. fyrningarlógini er 5 ár frá, at kravið er fallið til gjaldingar. Kravið fyrnar, um kravánari ikki fyri fyrningarfreistina antin fær skuldaran at viðurkenna skuldina ella tekur rættarstig móti skuldara og uttan drál fylgir tey upp við rættarsemju, dómi ella aðrari rættaravgerð.

**<u>Um freist avbrotin við "rættaravgerð" (dómur ella semja)</u>:** Eftir "rættaravgerð" verður kravið fevnt av DL 5-14-4/NL 5-13-2 og harvið 20 ára fyrning - men stevning og/ella áheitan um arrest brýtur bert 5 ára fyrningarfreistina, so fyrningarfreistin er longd 5 ár.

**<u>Um freist avbrotin við "viðurkenning skuldarans"</u>:** Viðurkenningin hjá skuldara skal vera skrivlig, og hon skal vera einsíðug - t.e. leys av undirliggjandi skuld. *<u>Tað vil eisini siga, at kontuavrit og rykkjarar/áminningar eru ikki nóg mikið at bróta fyrningarfreistina</u>*.

Tá ið fyrningarfreistin er brotin, sum umrøtt omanfyri (við skrivligari, einsíðugari viðurkenning), verður kravið fevnt av 20 ára fyrningarfreistini í DL 5-14-4/ NL 5-13-2. Tá ið krav er fevnt av DL 5-14-4/ NL 5-13-2, er nóg mikið at geva skuldara áminning, so verður fyrningarfreistin longd í enn 20 ár. Einki krav er um, at áminningin skal vera skrivlig.